# »Nei til happing. Ja til lívið«

Happing kann oyðileggja eitt menniskja fyri lívið, og er ofta orsøk til sjálvmorð. Dugdu vit betur at taka hond um trupulleikan frá byrjan, kundu vit havt fyribyrgt nógvum syndarligum mannalagnum, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata

HAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Á Alheims Sálarheilsudegnum 10. oktober hevur Sinnisbati valt at varpa ljós á stóra trupulleikan við happing við tiltakinum "Nei til happing. Ja til lívið". Sambært Soffi Egholm, forkvinnu í Sinnisbata, er happing í Føroyum mest at líkna við ein burturtagdan trupulleika, sum fá tora at taka upp. Í Sinnisbata síggja tey avleiðingarnar, við at menniskju eru so sálarliga skadd av happing, at tey illa fáa virka í gerandisdegnum.

### Óbótaligar avleiðingar

Í sínum starvi sum psykoterapeutur kemur tað meir enn so fyri, at Soffi Egholm hittir menniskju, sum eru so oyðiløgd sálarliga av happing, at tey hava roynt at tikið lívið av sær, sum eina seinastu roynd at sleppa undan pínuni. Ofta gongur tað lang tíð, áðrenn hesi menniskju gera vart við seg, tí ræðslan fyri at siga frá, liggur djúpt í teimum.



*Í sínum arbeiði sum psykoterapeut sær Soffi Egholm alsamt fleiri menniskju, sum er sálarliga skadd fyri lívið sum avleiðing av at hava verðið happað sum børn*

Happingin hevur sannført tey um, at tey onki virði hava sum menniskju, og ofta eru tey komin so langt út, at tey halda seg hava uppiborið at verða happað. Ein onnur orsøk til, at tey onki siga, er ofta, at ræðslan fyri at verða happað mest sum hevur lammað tey, so tey ikki fáa hugsa klárt.

### Happing skapar happarar

Stóra avbjóðingin og ábyrgdin hjá læraraum, foreldrum og øllum, sum eru um børnini, er at duga at avdúka tekin um happing. Happaði børn hava ofta ilt í búkinum, høvuðpínu, orka ikki at eta, sova illa, hava ilt við at minnast ella fanga, tað, sum verður sagt við tey, ella tað, tey læra í skúlanum. Á sama hátt sæst ofta, at børn, sum annars hava dugað sera væl í skúlanum, knappliga byrja at klára seg illa.

Ein onnur álvarslig avleiðing av happing er, at hon í sær sjálvum ofta ger, at hesi børn seinni sjálvi verða happarar. Hartil vísa kanningar, at um onki verður gjørt fyri at steðga happarunum, gerast tey ofta seinni kriminell, tí tey onki ræðast longur. Soleiðis kann happing skjótt gerast ein ónd ringrás og ein stórur samfelagsligur trupulleiki.

- Endamálið hjá okkum við tiltakinum í miðlahúsinum er at fáa mynduleikar og skúlar til at gera okkurt ítøkiligt við happingartrupulleikan. Fyrsta stigið í hesum er at vekja fólk, so tey síggja álvaran í hesum í eyguni. Og fyrsta treytin er, at vit byrja at tosað opið um tað, sigur Soffi Egholm

## Opið hús í Miðlahúsinum

Í sambandi við, at 10. oktober er Alheims Sálarheilsudagur, skipar Sinnisbati fyri tiltakinum "Nei til happing. Ja til lívið" í Miðlahúsinum í Vágsbotni mánadagin kl. 17.00. Tiltakið verður skipað sum opið hús í millum 17 og 19, har ymsar framløgur verða á skránni. Andreas Petersen, løgtingslimur, leggur fyri, og síðani fara Tormóður Stóra, sálarlækni, Soffi Egholm, psykoterapeut, lærarar og onnur at halda fyrilestur.

Soffi Egholm, formaður í Sinnisbata, sigur, at tey hava valt at seta evnið happing á breddan, tí alt ov lítið verður gjørt við hendan trupulleikan, bæði í skúlaverkinum og frá politiskari síðu. Tiltakið er ikki minst ein áheitan á øll um at halda eitt vakið eyga við børnunum, so tekin um happing kunnu verða avdúkað so skjótt, sum til ber.




*Børn, ið verða happað, hava ofta ilt við at læra og ring bindindi til at vera í skúla*

# Myndugleikar undirmeta happing

Í Skúlablaðnum hesuferð er stórt tema um happing. Blaðstjórin Turið Kjølbro sigur, at blaðið kennir tað sum sína skyldu at taka trupulleikan upp og vísir á, at tíverri tykist tað sum, at hvørki politiskir ella skúlamyndugleikar taka happing í nóg stórum álvara

HAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað er ikki hugaligur lesnaður í Skúlablaðnum hesuferð, har stóra evnið er happing. Tungar persónligar lagnur, har at dagligur ágangur hevur máað alt sjálvsálit burtur hjá barninum, alt íméðan ein kanning vísir, at bara onkur einstakur føroyskur fólkaskúli roynir ítøkiliga at taka hond um trupulleikan. Og hjá evsta skúlamyndugleikanum, Mentamálaráðnum, tykist lítil hjálp verða at heinta.

### Happing kann fyribyrgjast

Hóast ongin kanning er gjørd av, hvussu umfatandi happing er í føroyska fólkaskúlanum, hava vit onga orsøk at halda, at trupulleikin er minni hjá okkum enn aðrastaðni. Brúka vit til dømis nýggju kanningina hjá Børnerådet og Dansk Center for Undervisningsmiljø sum mátistokk, merkir hetta, at 1-2 næmingar í hvørjum skúlaflokki verða happaðir dagliga ella fleiri ferðir um vikuna.

Turið Kjølbro, blaðstjóri á skúlablaðnum, sigur, at ein av orsøkunum til, at Skúlablaðið hevur valt at taka evnið upp, er, at tað tykist, sum at fólka hava lyndi til at undirmeta trupulleikan við happing í Føroyum. Hon vísir á, at tað eru greiðar ábendingar um, at happingin ikki er minni her hjá okkum enn í hinum londunum, heldur kanska meiri umfatandi. Í okkara grannalondum verður arbeitt miðvíst við at fyribyrgja happing og at koma happing til lívs, bæði við lóg og føstum mannagongdum úti í skúlunum. Og kanningar vísa, at tað hevur minkað happingina munandi, t.d. í Noregi minkaði happingin við einum helmingi eftir tveimum árum, tá skúlarnir av álvara fóru í hernað móti trupulleikanum. Kortini meta føroyskir mynduleikar, at tað eru aðrir meir átrokandi spurningar og mál, sum eiga at verða raðfest hægri, og vit síggja eisini, at tað eru skúlar, sum als ikki taka happing í álvara, sigur Turið Kjølbro



*Turið Kjølbro, blaðstjóri á Skúlablaðnum, vísir á, at tað eru skúlar í Føroyum, sum als ikki tykjast at taka trupulleikan við happing í álvara*

- Í mínum hugaheimi er einki týdningarmeiri, enn at øll føroysk skúlabørn hava tað gott í skúlanum, og at happing als ikki verður góðtikin. Eitt er, at barnið, sum ikki hevur tað gott, ikki lærir ella hevur bindini til at vera í skúla. Annað er, at happing kann hava óbótaligar avleiðingar fyri barnið, sum verður happað. Tí metir Skúlablaðið tað vera sína skyldu at varpa ljós á happing, sigur Turið Kjølbro.